Hanna D. Andreassen

Fra: Maria Heradóttir <m.heradottir@gmail.com>
Sendt: mánadagur, 5. januar 2026 21:31
Til: Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Emne: Broytingaruppskot til Dagstovnalógina

Til røttu viðkomandi,

Sí viðmerkingar til broytingaruppskotið til dagstovnalógina:

Tað er ikki lætt at vita, hvat liggur í ymsum lyklaørðum. M.a. verður "tørvur" nevndur, men hvat er ein tørvur, og nær krevur ein tørvur, at stig verða tikin?

Málmenning sum sjálvstøðugt stevnumið er framvegis ikki tikið við, hóast tað hevur manglað í 25 ár. Her eru vit eftirbátar í Norðurlondum, sum øll halda seg hava fyri neyðini at staðfesta og nágreina við lóg og í leiðbeiningum, hvat málmenning er og inniber. Eisini eiga vit at hava ein "mátistokk" av onkrum slagi, sum mátar, hvar børn eru í málmenningini, soleiðis at tað ikki bert hvílir á subjektivum metingum. (Soleiðis ber eisini til at staðfesta tørvir.) Málmenning má eisini nevnast við orði, soleiðis at økið ikki dettur niðurímillum hini stevnumiðini. Her livir broytingaruppskotið ikki upp til "dagsins tørv" og "samfelagsligar broytingar" seinastu 25 árini.

Uppskotið setur karmar fyri námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga ráðgeving. Hvat er ella hvussu umskarast "námsfrøðilig ráðgeving" og "sernámsfrøðilig ráðgeving"?

"Uppskotið skal tryggja øllum børnum javnbjóðis og dydgargóð tilboð". Ber tað til, uttan so at fleirmæli eisini fær rúm? Her hugsi eg serliga um tilflutt børn av føroyskum, útlendskum ella blandaðum uppruna.

Eg vil staðiliga mæla til, at málmenning verður tikið upp og viðgjørt, áðrenn broytingaruppskotið verður samtykt. Tað tænir øllum børnum, sum øll eru meir ella minni fleirmælt í dag. Og tað tænir eisini føroyska málinum.

Vinarliga
Maria Heradóttir